## Girðing við gosið

Í Íslandi hava myndugleikarnir gjørt av at seta upp girðing, sum skal forða fyri, at fólk fara ov nær grótbræðingini frá gosinum á Fimmvørðuhálsi við Eyjafjallajøkul. Myndugleikarnir siga, at nógv fólk fara alt ov nær grótbræðingini uttan at geva sær far um, at tað kann vera lívshættisligt. Harafturat er tað hent fleiri ferðir, at fólk eru vilst, og at bjargingarfólk hava verið noydd at fara teimum til hjálpar. Tað kann vera lívshættisligt at villast uppi í fjøllunum hesa ársins tíð, tí har frystir eini 15 stig um náttina, skrivar Morgunblaðið.



## Færri sjálvmorð

Tey seinastu tíggju árini er talið á sjálvmorðum í Finnlandi minkað ein triðing, og sambært einum professara er tað fyri ein part sosialum skipanum sum Facebook, Twitter og MySpace fyri at takka. Hagtølini vísa, at í 1990 tóku 1.500 finnlendingar lívið av sær, og at í fjør vóru tað 1.000, sum gjørdu av við seg. Jouko Lonnqvist, professari, sigur, at hentleikar sum fartelefonin og sosialar skipanir sum Facebook, Twitter og MySpace hava verið viðvirkandi til, at sjálvmorðini eru fækkað munandi. Hann vísir á, at fólk kenna seg ikki so einsamøll longur.



*Vøggustovuplássini í Tórshavnar kommunu eru í so fá*

# Ov fá vøggustovupláss í Havn

**Tórshavnar kommuna hevur júst sent bræv til teirra, sum í august fáa tillutað vøggustovupláss**

BARNAANSING
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Trotið á vøggustovuplássum í Tórshavnar kommunu ger, at fleiri mammur ikki sleppa til arbeiðis. Tær, sum eru stakir uppihaldarar ella ikki eru giftar, hava møguleikan at søkja Almannastovuna um stuðul vegna vantandi barnaansing, og Almannastovan upplýsir, at nú eru fimtan mammur í Tórshavnar kommunu í tí støðuni.

Men tey, sum standa á bíðilista til vøggustovupláss í Tórshavnar kommunu, hava júst fingið bræv frá kommu-nuni um, at tey fáa pláss í august.

Tá verða yvir 200 vøggustovupláss leys.

Umleið 70 dagrøktarpláss verða leys samstundis, og boðini um, hvørji fólk fáa tey, verða send út fyrsta dagin, sigur Katrin Petersen, leiðari á barna- og ungdómsdeildini í Tórshavnar kommunu.

Bíðilisti er bæði til vøggustovupláss og dagrøktina í Tórshavnar kommunu, men tann bíðilistin hvørvur, tá ið leysu plássini nú verða útlutað. Út á heystið verður væntandi aftur bíðilisti til vøggustovur og dagrøkt.

Eingin bíðilisti er til barnagarðspláss.

Málið hjá kommununi er, at eingin bíðilisti skal vera, soleiðis at familjur, sum flyta í kommununi, beinanvegin kunnu fáa børn síni ansað.

Tí verður nú farið undir at byggja nýggjan dagstovn í Hoyvíkshaganum suður.

Hóast kommunan er vaksin, er barnatalið minkað seinastu árini. Tað eru avleiðingar av kreppuni í 90-árunum, tá ið so nógv fólk fluttu av landinum.



*Kommunuval var í Føroyum 11. november 2008, men longu nú verður nýval á Húsum fyri at fáa kommunustýrið fullmannað aftur*

# Stríðsval á Húsum

**Meira enn ein listi er komin inn til at velja írestandi kommunustýrislim á Húsum, og tí má val til**

KOMMUNUVAL
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Stýrið í Húsa kommunu hevur ikki kunna virkað seinastu tíðina, tí tað er ikki fullmannað vegna fráflyting. Tí tók Annika Olsen, landsstýriskvinna avgerð um, at nýggjur kommunustýrislimur skal veljast.

Freistin at stilla upp til valið á Húsum var úti týsdagin, og inn komu tveir listar. Sostatt verður veruligt val, sum er ásett at verða 20. apríl.

Forkvinnan í valstýrinum í Húsa kommunu, Dora Joensen vil ikki upplýsa, hvussu nógv fólk samanlagt eru á teimum báðum listunum. Grundgeving hennara er, at hetta ikki viðkemur øðrum enn borgarunum í Húsa kommunu.

## Rullaði av súkkluni

FERÐSLUÓHAPP
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Ein maður slapp rímiliga væl frá einum ferðsluóhappi á Æðuvíkarvegnum týskvøldið.

Hann koyrdi á motorsúkklu fyri at koma uttan um ein bil, koyrdi hann út í kantin. Tá var hann óhepin og gleið av vegnum. Maðurin rullaði fleiri ferðir runt. Í ferðini breyt hann økslina, sigur politiið í Runavík.

## Klaga um galandi hanar

KLAGA
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Fólk hava loyvi til at ganga úti og mala um náttina, men tað hava hanar í Tórshavnar kommunu ikki.

Politiið fekk í gjár eina klagu um hanar, sum gólu úti klokkan tvey um náttina.

Tað gongur ikki, tí sambært ásetinginum hjá kommuni um flogfenað, skulu hanar vera undir taki millum klokkan 21 0g 08. Hetta er galdandi fyri tey øki, har loyvt er at halda flogfenað.

Nógvastaðni er tað als ikki loyvt.